

# "Vit síggja ikki eitt kjøtpetti, men ein stakkals dripnan kálv"

**Matvøruhandlar selja deyð djór, sum hava havt eina syndarliga tilveru, meðan tey vóru á lívi. Hesum ynskir ein ung havnarfamilja ikki at stuðla, og tí eru tey øll vegetarar.**

Fyri fýra árum síðani góvust Joan Poulsen og Janus úr Dímun at eta kjøt. Hetta hendi eftir, at tey høvdu havt fleiri samrøður við vinir í Danmark, sum vóru vegetarar.

– Vit hildu, hesi vinfólk vóru fullkomiliga langt úti, tí tey ikki ótu kjøt. Men tá ið vit settu okkum inn í málið, broyttu vit støðu, greiðir Joan frá, meðan hon leggur putlispæl saman við 2 ára gomlu dóttrini, Jóhannu, sum eisini er vegetarur.

– Fyri okkum er hetta ein moralskur spurningur, tí tú kanst ikki láta sum onki, tá ið tú kennir sannleikan um búrhøsn, djóraflutning og aðra djórapínslu, sigur Janus.

– Í fyrstani ætlaði eg bara at gevast at eta innflutt kjøt. Eg trúði ikki, at eg kundi vera føroyska kjøtið fyri uttan, og seyðurin í Dímun hevur eitt gott lív, áðrenn hann verður flettur. Men matur er ein vanasak, og eg mungi ikki eftir kjøti longur, sigur Janus smílandi.

Tá ið Joan og Janus síggja ein búff, so síggja tey ikki bara eitt kjøtpetti, men ein stakkals dripnan kálv. Djóravælferð hevur nógv at siga fyri tey, og tey eru limir í danska felagsskapinum Anima, sum hevur eina virkna heimasíðu og gevur blað út eina ferð um mánaðin.

Spurningurin um djóradráp kann vera rættililiga kensluborin, og tey bæði hava eisini upplivað, at fólk kenna seg stoytt og ákærd, tí tey bæði velja at liva eftir sínari sannføring.

– Fólk kunnu spyrja, hví vit halda, at djór eru til ella siga, at tað stendur í Bíbliuni, at vit skulu drepa djór. Men eg tími ikki at svara slíkum, sigur Joan.

Lítla familjan etur heldur ikki fisk ella egg frá búrhøsnunum, og leðurskógvarnir eru eisini lagdir á hillina.

Men onkrar neyðloysnir hava eisini verið neyðugar. Tað er til dømis ikki lætt at fáa vistfrøðiligari mjólk í Føroyum, og tvey ára gamla Jóhanna fær vanliga føroyska mjólk.

– Eg veit ikki, hvat vit fara at gera, tá ið Jóhanna verður størri og kanska fer at biðja um kjøt. Hon skal sjálvandi sleppa at velja sjálv, men eg vóni, at hon verður vegetarur, sigur Joan og hyggur at lítlu dóttrini, sum hvønn dag fer væl nøgd í vøggustovu við ertrapostei í matpakkanum.

# "Longu sum eitt ára gomul vildi eg ikki eta kjøt"

**Fyri 35 ára gomlu Manijeh Elsu Modi hongur vegetarlívið saman við jogavenjing og einum barndómi uttan kjøt í India.**

Manijeh hevur frá barnsbeini av mest havt hug á mati, sum ikki kemur frá djórum, men tað var, tá ið hon lærdi til jogalærara, at hon fekk styrkina og hugin at vera reinur vegetarur.

– Hvørja ferð eg havi verið á jogaskeið, havi eg lagt okkurt av. Fyrst gavst eg at drekka sodavatn, síðani svart te, so grønt te, og so framvegis. Broytingarnar hava ongantíð verið torførar, tí eg havi bara mist hugin, greiðir Manijeh frá.

– Í joga arbeiðir tú so miðvíst við kroppinum og tær sjálvum, at allir sansir verða meira viðkvæmir. Tú uppdagar, hvussu gott tú fært tað, tá ið tú ikki etur kjøt, og tú fært eisini styrki til at gera tað, sum er best fyri teg og tín kropp, sigur Manijeh, sum fyri stuttum flutti aftur til Føroya, eftir at hava búð fleiri ár í Danmark.

Hugurin til kjøt hevur altíð verið lítil hjá Manijeh, sum er fødd í India og búði har saman við føroysku mammu síni og indiska pápa sínum, til hon var 11 ára gomul.

– Longu sum eitt ára gomul vildi eg ikki eta kjøt. Mamma og babba vóru bæði líka bangin um meg, og mamma fór til læknan við mær. Hann segði, at tað var ongin grund at stúra, so leingi sum eg fekk flatbønir og annað gott nakrar ferðir um vikuna, greiðir Manijeh frá.

Hennara mótmæli ímóti at eta kjøt var ikki grundað á nakra sannføring av nøkrum slag, men bara ein barnsligur mótvilji ímóti at eta nakað, sum hon ikki helt smakkaði væl.

Sum vaksin hevur valið at liva sum vegetarur verið meira tilvitað.

– Men eg havi ongantíð verið fanatisk, og tá ið eg havi verið heima og ferðast, havi eg onkuntíð etið kjøt. Í dag livi eg sum reinur



vegetarur, men eg havi ongar trupulleikar við, at onnur ikki liva, sum eg.

Manijeh heldur, at hugburðurin hjá føroyingum til mat er nógv broyttur tey seinnu árini, og úrvalið í matvøruhandlunum er økt samsvarandi, men hugburðurin til djóravernd er ikki nógv broyttur.

– Í Føroyum verða seyðir væl viðfarnir av flestu bóndum. Men djórapínsla fer eisini fram her, og vit keypa nógv innflutt kjøt. Tí áttu vit at verið meira tilvitað um, hvussu djórini, sum enda á døgurðaborðinum, hava verið viðfarin, meðan tey eru á lívi, sigur Manijeh avgjørd.

Framhald á næstu síðu ▶